# TÍÐINDI

SAMBAND
JÁKUP MØRK
JAKUP@SOSIALURIN.FO
TLF. 341800

Keypssamtøkan í Vágum

FK í Vágum sóknast eftir

**Fólki**

at starvast í handlinum



Arbeiðstíðin verður 30 tímar um vikuna

Løn:
Sambært sáttmálan við S & K

Nærri fæst at vita við at venda sær til Álv Samuelsen, tel 221130

Skrivlig umsókn skal, skjótast til ber, ella í seinasta lagi 20. februar sendast til

FK Vágar
370 Miðvági
att: Álvur Samuelsen
tel 332950



RØRSMIÐJUR

Vit sóknast eftir einum rørsmiði at byrja skjótast gjørligt

**Tín førleiki**
Vit vóna, at tú ert dugnaligur, íðin, nærlagdur og sjálvstøðugur. Harafturat skalt tú skilja týdningin av góðum handverki.

**Afturfyri bjóða vit**
Tú fært góðar arbeiðsumstøður og eitt mennandi fakligt arbeiðsumhvørvið.
Stutt sagt – eitt starv í einari spennandi og fjøltáttari fyritøku í støðugari menning.

Um tú hevur spurningar, ert tú vælkomin at ringja til Arthur á tel. 21 96 00 ella 31 20 00.

**Maria Poulsen pf**
Postmoga 182
FO-110 Tórshavn

Maria Poulsen





*Ein rætt, ið er 27 ára gomul, er púra skolað burtur av brimi. Jarnstengurnar, ið festu rættina, liggja bendar fram eftir jørð*

# Ódnarveðrið eisini ógvusligt í Víkarbyrgi

**Tað gekk ein vika, áðrenn kavin varð grivin á koyrivegnum til Víkarbyrgis, og tá sást, at ódnarveðrið eisini rakti meint har**

ÓDN
*Dagfinn Olsen*
*dagfinn@sosialurin.fo*

Ódnarveðrið fyri hálvari aðru viku síðani rakti eisini meint í Víkarbyrgi. Har býr ikki fólk longur, men tað eru tey, ið halda nógv av at koma har regluliga og húsast í nakrar dagar.

Ein av hesum, ið plagar at koma í eitt av fáu húsunum í Víkarbyrgi, vidi til endans hava kavan grivnan burtur, ið fjaldi koyrivegin til Víkarbyrgis.

Tá fólk góða viku eftir ódnarveðrið sluppu til Víkarbyrgis sást, at ódnin hevði rakt meint har eisini, eins og so manga aðrastaðni.

Brimið hevur staðið langt niðan í bøin. Ein rætt, ið er 27 ára gomul, er púra skolað burtur av brimi. Jarnstengurnar, ið festu rættina, liggja bendar fram eftir jørð.

Ett gróthús, ið stendur niðarliga, hevur fingið veggin, ið vendir móti havinum, kroystan nakað væl inn. Húsið hevur staðið í 150 ár, og stóð eisini í mong ár, innan verjugarður varð gjørdur í Víkarbyrgi.

Aliútgerð, sum ikki er í nýtslu, men sum enn er á staðnum, hevur fingið stóran skaða. Alikør eru í knúsi, eins og rør og káplar eru slongd ymsar vegir. Menn vita ikki um, at ódn hevur rakt so meint á staðnum fyrr.